# Favorittarnir sigraðu á Oscar veitsluni

**Hellen Mirren og Forrest Whitaker vunnu eins og spátt var frammanundan Oscar heiðurslønirnar til bestu leikarar. The Departed vann heiðurslønina sum besti filmur og leikstjórin Martin Scorsese varð kosin besti leikstjóri**

OSCAR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Oscar veitslan er uttan samanbering størsta kvøldið innan filmsídnaðin. Hóast heiðurslønin í stóran mun vendur eyguni ímóti Hollywood, so er hetta kvøldið har allur heimurin vendur eyguni ímóti Kodak Theatre. Fyri tey, ið eru tilnevnd er hetta kvøldið har tey kunnu gerast ódeyðilig.







*Ovast:*
*Forrest Whitaker vann Oscar fyri leiklutin sum einaræðisharrin Idi Amin*
*Mynd: Scanpix.dk*

*Í miðjuni:*
*Leikstjórin Davis Guggenheim og fyrrverandi amerikanski varaforsetin Al Gore gleðast um Oscar heiðurslønina fyri besta dokumentarfilm*
*Mynd: Scanpix.dk*

*Hellen Mirren takkaði m.ø. Elisabeth drotning, tí uttan hana hevði hon ikki kaunnað vunnið Oscar heiðurslønina fyri leiklutin sum Elisabeth.*
*Mynd: Scanpix.dk*

### Favorittsigrar

Nógv hevur verið spátt um, hvør fór at fáa hvørja heiðursløn. Serliga í heiðurslønunum til bestu leikarar í høvuðsleiklutum vóru fólk á einum máli um, at Hellen Mirren og Forrest Whitaker fóru at vinna fyri sínar leiklutir í The Queen og í The Last King Of Scotland. Tveir sterkir leiklutir, har Mirren meistarliga fyllur leiklutin sum drotning Elisabeth og Forrest Whitaker er bølmenni úr Uganda, Idi Amin. Tá avtornaði vóru tað eisini hesi bæði, ið fingu Oscar heiðurslønirnar við sær heim.

### Al Gore vann

Ein av mest umrøddu Oscarheiðurslønunum hevur seinnu árini verður heiðurslønin fyri besta dokumentarfilm. Serliga eftir, at Michael Moore við sínum sera politisku filmum hevur vunnið hesa heiðursløn, er fokus sett á hana. Aftur í ár var eitt stórt navn millum tey tilnevndu. Fyrrverandi forsetavalevnið og varaforsetin, Al Gore og hansara filmur um veðurlagsbroytingar, The Inconvenient Thruth gjørdist eisini vinnarin av Oscar heiðurslønini. Nógv hevur verið tosað um, hvørjar avleiðingarnar av einum sigri til Gore fór at verða. Onkur gitti, at um hann vann fór hann í taluni at kunngera, at hann tekur kappingina upp við Hillary Clinton og Obama Hussein Barrack um at gerast forsetavalevni hjá demokratunum. Men hetta hendi ikki, ístaðin vísti Gore á, at neyðugt var, at øll lond tóku umhvørvistrupulleikarnar í álvara.

### Endiliga Scorsese

Ein av best umtóktu handanum mundi vera, tá Martin Scorsese fekk Oscarin fyri leikstjórnina av filminum The Departed. Hóast Scorsese sjey ferðir síðan 1980 hevur verið tilnevndur, hevur hann ongantíð vunnið hendan heiður. Men The Derparted megnaði tað, sum Raging Bull, The Last Temptation Of Christ, Goodfellas(leikstjórnan og leikrit), The Age Of Innocence, Gangs Of New York og The Aviator ikki megnaðu. Scorsese var sera glaður og takkaði ikki færri enn 12 ferðir fyri heiðurin.

### Væluppløgd Ellen

Ellen DeGeneres var vertur fyri Oscar heiðurslønirnar og hetta kom hon sera væl frá. Hennara monologur í byrjanini, man vera ein tann besti, ið er sæddur í eini Oscar handan. Hon var stutt sagt sera stuttlig. Fyri Ellen var hetta ein barndómsdreymur. Hon greiddi frá, at meðan nógv børn fantasera um eni Oscar hevði hon fantasera um at verða vertur. Moralin í hesum helt hon vera, at børn um allan heimin átti, at seta sær lægri mál.

## Hesi vunnu Oscar heiðurslønirnar

**Besti filmur**
The Departed

**Besta leikstjórn**
Martin Scorsese, The Departed

**Besta nýggja leikrit**
Michael Arndt, Little Miss Sunshine

**Besta tillagaða leikrit**
William Monaham, The Departed

**Besti kvinnuligi høvuðsleikari**
Hellen Mirren, The Queen

**Besta cinematografi**
Guillermo Navarro, Pan's Labyrinth

**Besti manligi høvuðsleiklutur**
Forrest Whitaker, The Last King Of Scotland

**Besta filmklipping**
Thelma,Schoonmaker, The Departed

**Besti filmur á øðrum máli enn enskum**
Lívið hjá hinum (Týskland)

**Besta ljóðarbeiði**
Alan Robert Murray og Bub Asman, Letters From Iwo Jima

**Besti sangur**
I Need To Wake Up, Melissa Etheridge úr An Inconvenient Truth

**Besta ljóðbland**
Michael Minkler, Bob Beemer og Willie Burton, Dreamgirls

**Besti tónleikur**
Gustavo Santaolalla, Babel

**Besta Art Direction**
Eugenio Caballero fyri Art Direktion og Pilar Revuelta fyri Set Dekoration í Pan's Labyrinth

**Besti dokumentarfilmur**
An Invonvenient Truth

**Besti stutti dokumentarfilmur**
The Blood Of Yingzhou District

**Besti kvinnuligi leikari í einum hjáleikluti**
Jennifer Hudson, Dreamgirls

**Besta make up**
David Martí and Montse Ribé, Pan's Labyrinth

**Bestu klædnasnið**
Milena Canonero, Marie Antoinette

**Besti teknaði stuttfilmur**
Den Danske Dikteren, Noreg

**Besti stuttfilmur**
West Bank Story

**Besti teknaði filmur**
Happy Feet

**Bestu Visuellu effektir**
John Knoll, Hal Hickel, Charles Gibson og Allen Hall, Pirates Of The Caribbean: Dead Man's Chest

**Besti mannligi leikari í hjáleikluti**
Alan Arkin, Little Miss Sunshine

**Serliga Oscar heiðurslønin**
Ennio Morricone

*Kelda: oscar.com*